

# Terji Rasmussen

*Hvussu fert tú at halda jól í ár?*
– Saman við yngstu døtrum mínum, unnustini og hennara familju. Vónandi kemur jólamaðurin á gátt við góðum pakkum til børnini. Ivaleyst verður etið nakað ríkiligt av góðum mati og góðgæti. Hetta verða eini jól, har børnini eru í miðdeplinum.

*Hvat etur tú til døgurða á jólum?*
– Jólaaftan eta vit dunnu. Fyrsta dag verður helst borðreitt við røstum kjøti.

*Hvat er tað besta við jólum?*
– Hugnin saman við børnunum. Tá tey ikki eru har, vil eg helst sleppa undan jólunum.

*Hvat er minni gott við jólum?*
– Fólk tosa ofta um stressaríið upp undir jólini, men eg haldi at tað er, sum ein ger tað til sjálvur. Eg tími so ikki at leypa uppí tann vognin.

*Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?*
– Ja. Nakrar ferðir í ymiskum samanhangum. Tað hevur kanska ikki altíð verið so jólaligt, men seinastu jól hildu unnustan og eg jól hjá mammu og systur míni í Sorø. Tað var rættiliga hugnaligt.

*Hvønn jólatónleik dámar tær best?*
– Bara hann fær meg í jólahýr, so er líka mikið hvør sjangran er.

*Hvat ynskir tú tær í jólagávu?*
– Bleytar pakkar frá innast til uttast.



















